# Naggatódn í Miðeystri

Í seinastuni hava ísraelsmenn og umboð fyri Hamas tingast um treytirnar fyri, at Hamas kann lata ísraelska hermannin Gilad Schalit leysan, men nú er naggatódn komin í samráðingarnar. Hamas kravdi at fáa fleiri fangar, sum sita í ísraelskum fongslum, leysar í býti við hermannin, men tað kundi ísraelska stjórnin ikki ganga við til. Ein týskur semingsmaður roynir at fáa semju millum partarnar, men hann sigur við AP, at sum er eru eingi útlit fyri nakrari semju í bræði. Gilad Schalit hevur verið fangi hjá Hamas síðani í 2006, tá hann bleiv tikin og burturfluttur til Gaza-geiran.



# Eingin nýbygging

Ísraelski forsætisráðharin, Benjamin Netanyahu, ger nú eiona roynd at fáa gongd á friðarsamráðingarnar við palestinar. Fyri at vísa sín góða vilja hevur forsætisráðharrin biðið stjórnina góðtaka eitt uppskot um at steðga allari nýbyggning á Vestara Áarbakka, soleiðis at einki verður bygt har teir næstu 10 mánaðirnar. Royndin hjá Netanyaho kemur, eftir at palestinskir talsmann hava ávarað um, at talan verður ikki um nakrar samráðingar, so leingi ísraelsmenn halda fram at byggja bústaðir á hersettum øki á Vestara Áarbakka.

# Reiðarar og fiskimenn næstan samdir

**Sáttmálasamráðingar ímillum Reiðarafelagið og fiskimannafelagið eru næstan komnar á mál í sátt og semju**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samráðingarnar um nýggjan sáttmála millum fiskimenn og reiðarar hava verið óvanliga stillar og friðarligar, staðfestir formaðurin í Reiðarafelagnum, sum sigur, at tað ber ikki so frægt sum til at droyma um hægri hýrur*
*Tilvildarlig mynd*

Fiskimenn skulu ikki seta nøsina upp eftir hægri hýru næstu tíðina.

Tað er greitt eftir at Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið hesar seinastu dagarnar hava samráðst um ein nýggjan sáttmála.

Sáttmálin ímillum partarnar hevði farið úr gildi um eina viku tann 30. november og tað var Fiskimannafelagið sum segði sáttmálan upp.

### Kravdu hægri hýru

Herfyri segði Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum fyri Sosialinum, at kravið til reiðararnar fór at vera, at hýruprosentið skuldi upp og í einstøkum førum skuldi tað hækkast fleiri prosent.

Hann staðfesti, at í nítiárunum varð hýruprosentið á summum skipum lækkað rættiliga nógv og at tað skuldi nú fáast í rættlag.

Og hann staðfesti eisini, at vildu reiðararnir ikki góðtaka eina hækking, var vandi fyri, at skipini verða løgd.

### Næstan ongar broytingar

Hesum kravi hava reiðararnir avgjørdir víst aftur og tað gera teir framvegis.

Viberg Sørensen hevur sagt fyri Sosialinum, at hann væntaði ongar broytingar uttan onkrar smávegis dagføringar.

Og nú samráðingarnar hava verið, ásannar hann, at tað hava ongi stórmál verið á tapetinum.

- Hesar samráðingarnar hava verið óvanliga stillar og friðarligar og nú eru partarnir at kalla samdir um ein nýggjan sáttmála, sigur hann.

Hann sigur, at tað einasta, sum verður broytt í tí nýggja sáttmálanum eru onkrar smávegis dagføringar, sum onki kosta.

### Ikki rætta tíðin

Men hann staðfestir eisini, at hetta er ikki tíðin til tær stóru kollveltingarnar í viðurskiftunum hjá fiskiflotanum og tí kundi tað ikki koma upp á tal at hækka nakrar hýrur, sum støðan er nú.

- Í hesum tíðum ber ikki so frægt sum til at droyma um, at hýrurnar skulu hækka. Tað er vónleyst, tí fiskiflotin klárar ikki dagliga raksturin, sum er og tí ber ikki til at áleggja honum enn størri útreiðslur.

Hann sigur, at hýran hjá manningunum er roknað í prosentum av avreiðingarvirðinum og sostatt ferðast inntøkan upp og niður, alt eftir fiskiskapi og fiskaprísum.

- Vit hava ikki meirn enn eitt ávíst krónutal at býta og vit eru komin á eitt mark fyri, hvussu stóran part av hesi upphædd, manningin kann fáa í sín prosentpart, sigur Viberg Sørensen.

Eitt annað krav frá fiskimannafelagnum skuldu vera, at fiskimenn skuldu fáa frí ímillum jól og nýggjár.

- Tað hava teir allarflestu frammanundan, tí næstan ongi skip eru úti tá. Annars shava vit longu avtalað, at fara skip avstað millum jól og nýggjar, kunnu menn verða verandi heima, uttan at talan er um uppsagnargrund, so eitt slíkt krav hevur ongan praktiskan týdning, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard, hevur ongar viðmerkingar til málið nú.

Hann vil fyrst tosa við nevndina í Fiskimannafelagnum og annars staðfestir hann gmlu fyndarorðini hjá Anfinni Kallsberg, sum plagdi at taka til, at onki er liðugt fyrrenn alt er liðugt.

# Vágbingar halda akkurát tørn

**Vágs Býráð hevur samtykt fíggjarlógina fyri næsta ár og har er ikki nógv at geva av**

FÍGGJARÆTLAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vágs kommuna fær trongar karmar at virka undir næsta ár.

Tað er greitt, nú Vágsa Býráð á fundi í gjárkvøldið endaliga samtykti fíggjarætlanina fyri næsta ár.

Samtyktin vísir, at næsta ár verður at kalla bara nóg mikið av peningi til tann vanliga dagliga raksturin og tær lógarfestu útreiðslurnar.

Lítið og onki er sett av til íløgur. Tilsamans eru ikki meiri enn 823.000 krónur settar av til íløgur næsta ár.

Tað sigur eitt sindur um støðuna í Vági, at største einstaka íløgan hjá Vágs Býráði næsta ár eru 300.000 krónur, sum skulu brúkast til sitipláss við fótbóltsvøllin á Eiðinum, nú VB/Sumba er flutt upp í Voadafondeildina.

Hinar íløgurnar eru bara smávegis snøklar her og har.

### 100.000 krónur minni

Annars verður mett, at inntøkan hjá Vágs Kommunu verður 34,5 milliónir í kommunuskatti næsta ár og tað er 100.000 minni enn mett verður, at inntøkan verður í ár.

Harafturat verður mett, at kommunan fer at fáa 2,9 milliónir í ymsum gjøldum og øðrum inntøkum.

Annars fer sjálvur rakstrurin av kommununi at kosta 26 milliónir næsta ár og tá ið íløgurnar, rentur og avdráttir eru betaltar, gevur fíggjarætlanin næsta ár 22.000 krónur í avlopi.

Annars verður skattaprosent og barnafrádráttir óbroytt í Vági næsta ár, ávikavist 23,25% í skatti og 4000 krónur í barnafrádrátti.

*Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, ásannar, at næsta ár hevur Vágs Kommuna lítið at geva av*

